VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdadgin:
Gul til stívt andøvsgul mest av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 20 stig.

21 bólkar á Dávavirkinum

Í snotiligu hølunum Dávavirkinum í Klaksvík venja longu nú 21 bólkar, teir flestu av hesum eru rættiliga ungir og spæla sjálvskrivaðan tónleik.

TÓNLEIKUR
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Beinta Gregersen og Leivur Vitalis høvdu ikki væntað, at áhugin fyri venjingarhølum var so stórur.
Mynd: Niels Uni Dam

Meðan klaksvíkiungar gera seg klárar til Summar Festivalin, hitta vit tey bæði Beintu Árnadóttir Gregersen og Leivur Vitalis í snotiliga Dávavirkinum í Klaksvík. Nýggja spælistaðið og venjingarhølið eru longu heim hjá 21 lokalum bólkum, ið býta tey átta rúmini ímillum sín. Hetta er væl fleiri bólkar, enn nakar hevði væntað.

- Vit høvdu væntað, at vit fingu ein bólk í hvørt rúmið, men at áhugin var so stórur, hevði eingin torað at vónað, sigur Leivur.

- Teir flestu bólkarnir eru ungir bólkar, men onkur royndur bólkur so sum Pentagon Aria, Rani Nolsøe og Countrybólkurin eru eisini millum bólkarnar, sigur Beinta.

- Tað var stuttligt at koma út her í húsið nú ein dagin og hoyra metaltónleikur úr tveimum hølum, og so í Klaksvík!, vísir Leivur á.

Flestu bólkarnir spæla egnan tónleik, og sambært Leivi og Beintu tykist tað, sum nógv, ið hevur ligið í dvala, nú er komið fram.

Dávavirkið er í hesum døgum, karmur um venjing hjá tveimum Summar Festival aktuellum bólkum. Húskallar og Jógvan Hansen venja í snotiligu hølunum. Hetta er bert eitt dømið um samstarvið millum Summar Festivalin og Dávavirkið og Virkishúsið, ið rekur Dávavirkið.

Summar Festivalurin hevur eitt nú skrivstovu í Virkishúsinum. Beinta leggur heldur ikki skjól á góða sambandið millum festivalin og húsini.

- Teir hava verið ræðuliga góðir við okkum. Eitt nú lótu teir ljóðføri til Virkishúsið, og vóru beinanvegin til reiðar at keypa eina sponsorreklamuhurð her á Dávirkinum. Teir hava eisini sponsorera okkar blusur. Tá vit skulu brúka okkurt, eru teir beinanvegin til reiðar at lána okkum tað, sigur hon.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	9
Nuuk	--
Qaqortoq	8
Ammassalik	7
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	10
Lerwick	10
Aberdeen	13
London	17
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	18
Keypmannah.	18
Helsinki	17
Moskva	24
Berlin	17
Warzawa	18
Kiev	20
Bukarest	33
Paris	20
Madrid	35
Róm	28
Malorca	29
Athen	34
Malta	33
Tunis	33
Beijing	30
New Dehli	34
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	14
New York	25
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	31
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 988 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer norðureftir. Eitt annað lágtrtýst, 989 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og dýpist.



Í dag:
Djúpa lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 29/7 kl. 06⁰⁰ – 30/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/7 kl. 06⁰⁰– 30/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 73,0 mm

Ólavsøkublaðið fæst í Míðlahúsinum

Sosialurin hevur fingið fleiri uppringingar frá fólki, sum ikki fingu trivaliga og vælumtókta ólavsøkublað okkara, ið skuldi fara í hvørt hús í landinum. Tit, sum ikki fingu blaðið, kunnu fáa tað á skrivstovu okkara í Tórsgøtu 1 millum klokkan 8 og 16. Vit hava tó bert avmarkað tal av bløðum liggjandi. Tað verður ikki sent við postinum.

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

4. august Mánin næstur jørðini
5. august Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
2. aug	09.55	22.15	08.55	21.15	09.10	21.30	11.55	-	00.34	12.55	08.10	20.30	07.10	19.30	10.10	22.30	11.10	23.30	09.40	22.00	10.55	23.15
3. aug	10.35	22.56	09.35	21.56	09.50	22.11	00.15	12.35	01.15	13.35	08.50	21.11	07.50	20.11	10.50	23.11	11.50	-	10.20	22.41	11.35	23.56
4. aug	11.18	23.43	10.18	22.43	10.33	22.58	00.56	13.18	01.56	14.18	09.33	21.58	08.33	20.58	11.33	23.58	00.11	12.33	11.03	23.28	-	12.18
5. aug	-	12.34	11.34	-	11.49	-	01.43	14.34	02.43	15.34	10.49	23.46	09.49	22.46	-	12.49	00.58	13.49	-	12.19	00.43	13.34
6. aug	01.31	13.54	00.31	12.54	00.46	13.09	03.31	15.54	04.31	16.54	-	12.09	11.09	23.37	01.46	14.09	02.46	15.09	01.16	13.39	02.31	14.54